# Mín leiklutur sum reiðari fer at minka

**69 ára gamli Osmund Justinussen hevur verið reiðari í samfull 40 ár, og nú yngri og dugnaligar kreftir hava tikið yvir, samstundis sum felagið er farið at gera risaíløgur í supply-vinnuna, væntar hann, at hansara leiklutur sum reiðari fer at minka. - Tað er eitt rættiligt tómrúm, nú Stjørnan og Polarhav eru seldar. Alt her á jørð er farandi. Vit hava áður selt skip, og eisini tá kendi eg á mær sorgblídni. Ivaleyst fari eg at venja meg við hetta eisini, sigur maðurin, sum hevur verið reiðari á tilsamans 35 skipum og bátum**

Vilmund Jacobsen

Eftir at Norðoya Íløgufelag herfyri keypti ísfiskatrolararnar, Stjørnuna og Polarhav og 25% av Tavuni í Leirvík, sum er parturin, ið Osmund Justinussen átti, hava vit skift orð við 69 ára gamla reiðaran í Leirvík. Vit hava spurt hann, hvørjar ætlanir hann og sonurin, Tummas Justinussen, hava, nú teir eru farnir at selja burtur av fiskiskipa-og virkisvinnuni í Leirvík.

- Jú, fleiri hava spurt, hví vit hava selt Stjørnuna og Polarhav, og fólk hava eisini spurt, hvat vit nú ætla. Men sama samdøgur, sum vit seldu ísfiskatrolararnar, keyptu vit saman við Jónsveini Knudsen og Peturi Mohr ognirnar hjá Kjartani Joensen, sum eru fiskavirki og trý skip, útróðrarbáturin Høvnin og trolbátarnir, Birtingur og Norðleivur. Vit hava eisini rækjutrolaran, Havborg, sum fiskar í Ný Foundlandi – og ein 20-tonsara, Heiðrikk, sum liggur í Leirvík. So, hóast feløgini hjá okkum seinnu árini eisini hava gjørt nógvar íløgur í virksemi á landi, eru vit ikki heilt turrlagdir enn, sum Osmund Justinussen brosandi tekur til.



*- Nøkur menniskju hava fingið evnini at seta í verk, og tað er mín sannføring, at vit eiga at brúka okkara evni, har tey eru, sigur Osmund Justinussen Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hann dylur kortini ikki fyri, at tað er eitt rættiligt tómrúm í hansara lívi, nú Stjørnan og Polarhav eru seld av bygdini.

– Hinvegin fari eg ivaleyst at venja meg við tað eisini. Alt her á jørð er farandi. Vit hava áður selt skip, og eisini tá kendi eg á mær sorgblídni. Sølan av Stjørnuni og Polarhavi er ein ávís flytan úr fiskivinnu yvir í oljuvinnu, har vit frammanundan hava supplyskipið, Eldborg, sum vit fingu í juni mánað 2009. Nú vóna vit, at ísfiskatrolararnir fara at roynast nýggju eigarunum líka hollir, sum teir hava roynst okkum. Vit vita, at tað eru stak góðar og dugnaligar manningar, sum nú hava fingið høvi at halda fram við hesum skipum. Onkur hevur siglt hjá okkum í út við 40 ár – og nakrir í meiri enn 30 ár, leggur hann aftrat.

## Stórar íløgur

Tá Osmund Justinussen vísir á, at virksemið hjá felagnum í Leirvík flytir seg úr fiskivinnu yvir í oljuvinnu, sipar hann sjálvsagt til teir velduga stóru skipasáttmálar, sum felagið hevur.

- Vit hava í løtuni sáttmálar um tvey stór supply-skip, har tað størra er út við 90 metrar langt og 20 metrar breitt. Hitt skipið er eitt lítið sindur minni, umleið 87-88 metrar langt. Skrokkarnir verða smíðaðir í Turkalandi. Hin fyrri verður liðugur í næstu viku og verður síðan sleipaður til Noregs, har

